VÍF-StÍF 28-22 (14-7):

Tað sær spennandi út í Vestmanna

Talan gjørdist um ein undirhaldandi dyst, tá tvær av stóru føroysku hondbóltsbygdunum tørnaðu saman mikukvøldið. Spenningurin var tó í minna lagi, og átti ikki minst málverjin hjá VÍF skuldina í - ella æruna fyri - hesum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Spenningurin var hampuliga stórur, tá mannfólkini í Vestmanna fóru undir fyrsta heimadystin hetta kappingarárið.

Mótstøðuliðið var StÍF, og var tað nakað lið, sum í fjør megnaði at seta kílar í VÍF-maskinuna, so vóru tað júst strandingar, sum umframt at vinna steypakappingina eisini syrgdu fyri, at vestmenningar ikki kundu ogna sær greipuna.

Tað var merkisvert, at strandingar ongan tíð fóru út í mansverju av Inga Olsen, sum saman við Eli Müller í málinum var stóri profilurin hjá VÍF

Mynd: Álvur Haraldsen

Ymisk upplegg

Hjá báðum hava tó nakrar broytingar verið í ár, í mun til í fjør, men hóast hetta, so løgdu bæði liðini ógvuliga hart út, tða dysturin mikukvøldið varð blástur í gongd.

Bæði ferð og kraft var í spælinum frá byrjan, og frá báðum pørtum varð roynt at leggja stórt trýst á mótstøðuverjurnar. Tað var tó stuttligt at síggja, hvussu ymisk liðini vóru í hesum royndum, eins og stórur munur var á verjuspælinum hjá pørtunum báðum.

Hjá VÍF gekk tað kanska meira tungt fÿri seg, skilt á tann hátt, at tað serliga vóru tær báðar stóru kanónirnar, Sámal Joensen og Piddi Negru, sum hóttu, meðan kvikleikin og fótskifti hjá Inga Olsen var tað kreativa íkastið, sum av og á megnaði at taga strandaverjuna sundur, um so var, at hann ikki breyt ígjøgnum sjálvur.

Strandingarnir royndu at fáa sítt vørumerki – tað skjóttgangandi álopsspælið - at koyra uttan um VÍF verjuna, fyri síðani at bróta ígjøgnum, tá hol stóðust av hesum.

Í verjunum var tað serliga stuttligt at síggja, hvussu gestirnir royndu at takla VÍF álopini nakað úti frá málteiginu, og fyrstu løtuna eydnaðist hetta eisini sera væl til tíðir. Vestmenningar koyrdu her meira við flatari verju, har risastóri miðblokkurin skuldi byrgja fyri bakkunum hjá mótstøðuni.

Eli á muni

Málskjótingin hesa løtuna sýnir, at tað var hjá heimaliðnum, at spæliætlanin eydnaðist best, men burtursæð frá álopi og verju, so var tað serliga ein orsøk til, at so varð. Málverjarnir.

Strandingar hava í ár fingið ein rumenska málverja, men hóast hesin so sanniliga hevur sínar dygdir, so var hann minni maðurin, um sammett verður við avrikið hjá Eli Müller í VÍF málinum. Stóru styrki hansara er at lesa mótstøðumenninar av, tá hesir lata skotini ganga, og um onkur strandingur hevði marruna hósnáttina, so er tað einki forgjørt í tí.

Til tíðir sá tað út til, at tað snøgt sagt kundi gera tað sama, hvussu skotroyndirnar vóru. Sjálvsagt fekk málverjin eisini hjálp frá verjuni, men nakrar av bjargingum hansara vóru veruliga í serflokki.

Bjargingar hansara viðførdi fyri tað fyrsta, at vestmenningar kundu skræða seg eitt sindur leysar á máltalvuni, og í øðrum lagi, at dirvi hjá strandingum at skjóta minkaði í stórum, soleiðis at tað at enda nærum bert var leikandi venjarin, sum gjørdi nakað um seg. Serstakliga var hetta sjónligt seinasta partin av fyrra hálvleiki, og tað var eisini júst hendan løtan, sum legði lunnar undir trygga heimasigurin.

Áki við aftur

Tað mundi tó kennast sum ein smeitur fyri VÍF, at Piddi Negru tíðliga í dystinum noyddist út við einum skaða í hondini. Serliga í verjupartinum var saknur í hædd hansara, men í álopspartinum høvdu vestmenningar tó eitt fult so gott alternativ at seta inn.

Áki Olsen hevur drigist við ein knæskaða undan kappingini, og var ikki við í fyrsta dystinum hjá VÍF, men hesa ferð var hann so á beinkinum. Helst var ikki ætlanin, at hann skuldi spæla nakran serligan leiklut í dystinum, men tá Piddi so varð skaddur, mátti stórskjúttin inn.

Lat tað verða sagt alt fyri eitt, at enn er venjingarstøðan hjá Áka ikki somikið góð, at full nytta fæst burtur úr evnum hansara, men hinvegin eru hesi somikið stór, at sjálvt við hálvari ferð var hann ein ríkiliga stórur biti hjá mótstøðuverjuni og ikki minst – málverjanum

Undrunarvert

At vestmenningar høvdu vunnið sær eina somikið greiða leiðslu í hálvleikinum viðførdi, at gestirnir noyddust at satsa í seinna hálvleiki. Eina løtu sá eisini út til, at nakað av biti var í hesum royndunum, men tá teir so tvær ferðir upp í slag mistu í álopspartinum, samstundis sum vestmenningar revsaðu, fór seinasti ferðilin av spenningi úr dystinum.

Hóast hendan royndin hjá strandingum at venda dystinum sá út til órógva VÍF eina løtu, so vóru tað tó tveir lutir, sum undraðu ikki sørt í hesum royndunum.

Annar var, at StÍF ongan tíð fór út í eina mansverju av Inga Olsen, sum heilt greitt var stóri profilurin hjá VÍF. Ingi snøgt sagt stýrdi øllum álopunum hjá vestmenningum, og megnaði hann ikki at spæla viðleikarar leysar, var hann altíð maður fyri at bróta ígjøgnum sjálvur.

Hin var, at tað skuldu ganga 40 minuttir av dystinum, fyrr enn StÍF royndi at broyta nakað í strikuspælinum. StÍF hevði eisini sínar trupulleikar í hesum partinum í fyrsta dystinum móti Neistanum, og hóast hesin ikki kann loysast við nøkrum gandaorði, so var tað merkisvert, at Bent Djurhuus mátti bíða somikið leingi á beinkinum. Tað var nevnliga ikki fyrr enn hann kom inn, at talan veruliga gjørdist um strikuspæl hjá gestunum.

Sterkir meistarar

Sum sagt, so gjørdist talan, tá alt kom til alt, um ein hampuliga tryggan heimasigur, og hóast tað enn bert eru leiktir tveir dystir, so er tó sannlíkt, at VÍF aftur fer at gera nógv um seg í ár.

Størsti meinbogin undan kappingini varð roknaður at vera vongspælið, har bæði John Zachariasen og Martin Hummeland hava sagt fyribils farvæl, men nakar veruligur trupulleiki tóktist hetta tó ikki at vera mikukvøldið. Serliga tí Harald Bjørgvin og Johnny Joensen rúgvaðu sera væl upp á hesum plássi, men yvir høvur tí hópurin hjá VÍF tykist somikið breiður, at teir altíð hava onkrar alternativar møguleikar at tippa tey hol, sum íkoma á vøllinum.

Strandingar hava higartil tapt báðar sínar dystir, men hinvegin skal leggjast afturat, at hesir hava verið móti tveimum liðum, sum øll rona við í hondbóltsoddinum.

Í báðum dystunum hava tó verið tekin um, at StÍF eisini í ár fer at gera nakað um seg í hondbóltsoddinum. Útlendski íkastið á liðnum er av slíkum slag, at talan er um profilar, sum kunnu avgera dystir, og føroyski bulurin er avgjørt ikki veikur á nakran hátt. Tað kann væl vera, at strandingar ikki fara at gera meistarar í ár, men hinvegin er tað einki at ivast í, at teir fara at geva sítt íkast til, at talan aftur í vetur kann gerast um eina spennandi hondbóltskapping.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:

VÍF: Ingi Olsen 7(2), Áki Olsen 5(2), Harald Bjørgvin 5, Sámal Joensen 4, Johnny Joensen 4, Ragnar Zachariasen 1, Agnar Joensen 1, Piddi Negru 1

StÍF: Costin Dumitrescu 11(5), Artur Johansen 3, Bent Djurhuus 2, Sveinur Justinussen 2, Janus Trúgvason 2, Andre F. Danielsen 2

Brotskøst: VÍF 5, StÍF 5

Útvísingar: VÍF 6, StÍF 2

Dómarar úr Tjaldri: Trúgvi Mortensen og Kári Hansen. Framdu avgjørt síni mistøk á vegnum, men myndugleiki teirra syrgdi tó fyri, at teir alla tíðina høvdu tamarhald á tí, sum fyriførst á vøllinum.

Neistin-Stjørnan 19-27 (8-16):

Klassamunur

Neistakvinnur máttu ásanna, at trøini hóast alt ikki vaksa upp í himmalin. Stjørnan sýndi hinvegin heilt gott spæl til tíðir, og tær kunnu meira enn so gerast drúgvar, tá avtornar

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir eina góða byrjan upp á árið, komu neistakvinnurnar so dyggiliga niður aftur á jørðina, tá tær mikukvøldið spældu framskundaða dystin móti Stjørnuni.

Flestu høvdu helst roknað við, at Stjørnan fór at sýnast dekan ov sterk hjá teimum bláu, men Neistin hevði víst góðar taktir í teimum báðum fyrstu dystunum, og tí vónaðu tey helst, at tey kundu gera okkurt við klaksvíkingarnar. Tað kundu tær ikki, og tað kann hóskandi leggjast afturat, at tað var so langt ífrá.

Ferðin á muni

Tað var nevnliga hampuliga skjótt greitt, at tað var Stjørnan, sum var hitt betra liðið á vøllinum. Við litaviska stórskjúttanum, Simona Dziugyte, á odda, royndu tær alt fyri eitt at leggja trýst á bláu verjuna við kvikum álopsspæli, og ella so fingu skjúttarnir hjá Neistanum alla tíðina fylgt við gestunum, eisini hóast Stjørnan í Agne Masenite hevur funnið ein framúr góðan málverja. Fyrstu løtuna fekk hon tó als onga hjálp frá verjuni, men tá so samskiftið millum verju og málverja fekst at rigga, var ballið búið hjá heimaliðnum.

Tað var Stjørnan, sum alla tíðina var við yvirlutan, tá tær mikukvøldið vitjaðu Neistan í Gundadalshøllini

Mynd: Álvur Haraldsen

Seinasta korterið ella so av fyrra hálvleiki var verjan hjá Stjørnuni snøgt sagt ein múrur. Neistaliðið royndi at spæla seg ígjøgnum, men hetta eydnaðist ongantíð. Úrslitið gjørdist í flestu førum, at tær vórðu noyddar at skjóta útifrá, ella royndu tær at seta ferðina somikið høgt upp, at tær ikki megnaðu at fylgja hesum sjálvar.

Ikki bert ein

Sum nevnt omanfyri, so var tað serstakliga Simona Dziugyte, sum gjørdi um seg hjá gestnum fyrstu løtuna, men at Stjørnan eisini er annað og meira enn hendan eina, varð so týðiliga undirstrikað kortini.

Neistin valdi nevnliga rættiliga tíðliga at fara út at mansverja litavan, men hóast tað skerdi hennara leiklut í dystinum, so merkti hetta á ongan hátt, at Stjørnan steðgaði upp. Heldur gav hetta betri pláss til serstakliga Joan M. Joensen, sum við kvika fótskiftinum altíð er ein vandi, og ikki minst, tá mansverja av liðfeløgum gevur ein eyka metur ella so at flyta seg á.

Krydd skal til

Í seinna hálvleiki hendi ikki stórt meira enn tað, sum roknast kundi við. Stjørnan hevði nú fult tamarhald á dystinum, og settu tær tí leikferðina nakað niður. Hetta gav eisini Neistanum møguleikan at koma við aftur í dystin, men tað var tó ongan tíð soleiðis, at tær bláu megnaðu at skapa nakran spenning um, hvønn veg stigini skuldu fara.

Við sigrinum – og ikki minst spælinum aftan fyri hendan – staðfesti Stjørnan, at tær aftur í ár skulu takast í álvara. Hóast hondbóltsárið enn er ungt, so megnaðu tær í løtum at halda leikferðini høgt uppi, og tá tað so eisini eydnast verjuni at stressa mótstøðufólkini, skal hampuliga nógv til, áðrenn nakar skalar tær.

Enn hava tær so ikki roynt seg móti VÍF ella VB, og helst verður tað saman við hesum, at Stjørnan fer at stríðast um heiðursmerki.

Tað kann Neistin framhaldandi hava møguleika til, men dysturin mikukvøldið staðfesti, at skalt tú gera teg galdandi í hondbóltsoddinum í dag, so er ikki nóg mikið »bert« at hava ein góðan bul av føroyskum leikarum. Neyðugt er við útlendska kryddinum fyri at røkka tindum.

Dysturin í tølum

Neistin-Stjørnan 19-27 (8-16)

Málskjúttar:

Neistin: Birita Wardum 7(1), Katrin á Neystabø 6(3), Gunnleyg Berg 3, Mildrid Jacobsen 1, Kára á Dunga 1, Susan Brockie 1

Stjørnan: Simona Dziugyte 13(6), Joan M. Joensen 5, Anna Kristina Samson 4, Una Olsen 2, Andrijana Milodanovic 2(1), Beinta Klakstein 1

Brotskøst: Neistin 5, Stjørnan 7

Útvísingar: Neistin 1, Stjørnan 3

Dómarar úr Kyndli: Uni Wardum og Hannis Wardum. Stýrdu uttan stórvegis hóvasták dystinum við góðum myndugleika.

VÍF-StÍF 39-16 (18-8):

Avgreiðsluspurningur

Munurin var stórur, tá føroyameistararnir úr Vestmanna í fyrsta heimadystinum tóku ímóti uppflytarunum av vestara arminum á Skálafjørðinum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað var ikki annað væntandi, enn at talan skuldi gerast um ein tryggan heimasigur, tá kvinnurnar hjá VÍF mikukvølidð tóku ímóti teimum av Strondum.

Eingin ivi

Kvinnuliðið úr Vestmanna var í fjør nógv tað sterkasta í føroysku kappingini, og liðið tykist ikki á nakran hátt viknað hetta kappingarárið. StÍF er hinvegin júst afturkomið í bestu deildina, so at rokna við nøkrum stigi fyri teirra viðkomandi, var helst at seta nøsina nakað langt uppeftir.

Her er tað Nikolina, sum er á veg móti málinum, og yvir høvur hevði VÍF ongar trupulleikar av uppflytarunum av Strondum og Skála

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað var heldur ongan tíð nakar ivi um, at VÍF fór at vinna ein tryggan sigur mikukvøldið. Eftir fáum minuttum høvdu tær skapt sær eitt hampuliga stórt glopp niður til mótstøðuna, og hóast tær ongan tíð løgdu so øgiliga nógv fyri, so hildu meistararnir á at útbyggja leiðsluna ígjøgnum dystin.

Væl koyrandi meistarar

Hóast tað nevyan kunnu dragast so nógvar staðfestingar burtur úr einum slíkum dysti, so er tó einki at ivast í, at kvinnurnar úr Vestmanna aftur fara at gerast drúgvar í ár. Sera drúgvar.

Bulurin á liðnum er hin sami, sum fór ósigraður ígjøgnum kappingarárið í fjør, og nú Nicoleta Radu er komin fyri seg eftir beinbrotið og Jórun Ludvig har afturat er komin í hópin, er breiddni eisini økt nakað, so veikari eru tær á ongan hátt.

Skal nakar veikleiki finnast, er tað helst, at Manuela Stan í málinum er úti við bruna í hælsinuni. Ein skaði, sum við hvørt hevur lyndi at gerast drúgvari enn tær fýra vikurnar, sum talan í fyrsta umfarinum er um. Hallfríð Isaksen hevur tó áður sýnt seg sum eitt gott alternativ, men spurningurin í hesum sambandinum er helst, um hon megnar at halda eitt javnt gott støði ígøgnum eitt longri tíðarskeið. Mikudagin hevði hon tó ikki hetta fyri neyðini, men stóra styrkisroyndin í so máta verður helst annan sunnudag, tá Stjørnan kemur á vitjan í Vestmanna.

Dysturin í tølum

VÍF-STÍF 39-16 (18-8)

Málskjúttar:

VÍF: Ioana Rápa 8(1), Nicoleta Radu 7, Jacklin Durhuus 6, Jórun Ludvic 5(1), Sóley Mikkelsen 3, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 3, Alis Høghamar 3, Fríða Marjunardóttir 2(1), Randi Kúrberg 2

StÍF: Súnfríð Mikkelsen 5(2), Birna Mikkelsen 2, Ileana Manolescu 3, Anna Maria Berthelsen 2, Poula Olsen 2, Anna Berg 1

Brostkøst: VÍF 3, StÍF 2

Útvísingar: VÍF 2, StÍF 3

Dómarar úr Tjaldri: Trúgvi Mortensen & Kári Hansen